# Claus tímir ikki meir

**Síðani hann javnaði til 1-1 á Kypros og í sama dysti breyt eitt rivjabein, hevur tað ikki eydnast framrættaða spælaranum í Coventry at sleppa á liðið, og nú er tolið hjá honum uppi**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*



*Landsliðsleikarin Claus Bech Jørgensen hevur ikki hug til at halda fram í felagi sínum Coventry, og leiðslan í felagnum hevur eisini boðað honum frá, at fær hann nakað tilboð aðrastaðnis frá, kann hann fara fyri einki.*

*savnsmynd*

At tað kann ganga skjótt hvønn vegin í fótbólti, eru tað mong dømi um. Eitt er Claus Bech Jørgensen. Eftir at tað fyrsta kappingarárið hjá honum hevði gingið rættuliga striltið at sleppa framat í Coventry, so sá tað eftir summarsteðgin í fjør ljósari út. Fyrst varð hann skiftur inn nakrar ferðirnar, og tá ið hann á flogvøllinum í Luton hitti føroyska landsliðið, sum var á veg suður á Kypros, var lagið heilt gott, og tað var ikki so undarligt. Claus hevði júst vunnið sær fast pláss á miðvøllinum í Coventry, og góða máltevið var komið til sín rætt.

Á Kypros tóktist tað eisini skula ganga rætta vegin. Í 1. hálvleiki javnaði Claus til 1-1, og møguleikar tóktust skula vera fyri, at ferðin suður hagar skuldi nýtast sum reklamuferð. Men so var Claus óheppin. Ein løstur undir síðuni vísti seg at vera álvarssamur. Rivjabein var brotið, og eftir fyrru trý korterini í Nicosia kom Claus ikki á vøllin. Síðani hevur hann spælt millum lítið og einki.

Hóast tað var í landsdysti fyri Føroyar, at Claus varð skaddur, so er hann framvegis hugaður at spæla á landsliðnum.

– Eg havi tosað við Henrik Larsen, og eg eri framvegis sinnaður at umboða Føroyar, sigur Coventry spælarin, sum er kvalifiseraður at spæla fyri Føroyar, tí mamman er ættað úr Føroyum.

### Ætlar at skifta felag

Á jólum var Claus framvegis eymur av skaðanum á Kypros. Hann hevði tó vant nógv, og hann helt seg vera nóg væl fyri at spæla á besta liðnum í Coventry. Men hann slapp ikki framat.

– Nú er tolið uppi. Eg havi gjørt av við meg sjálvan, at eg ikki fari at halda fram í Coventry. Tað havi eg sagt venjaranum, Peter Reid. Sáttmálaskeiðið hjá mær her í Coventry er liðugt í summar. Men venjarin hevur latið meg vita, at um eg fái eitt tilboð nú í januar, so fara teir einki at krevja fyri meg. Alla staðni, har eg havi spælt, havi eg kent tað soleiðis, at felagið hevur fingið bonus fyri lønina, sum teir hava rindað mær. Soleiðis kenni eg tað ikki her í Coventry. Men eg haldi ikki, at eg havi fingið høvi at vísa, hvør dugur er í mær, segði Claus Bech Jørgensen stutt fyri jól við lokala blaðið í Horsens, sum hann er ættaður úr.

### Droymir um Ongland

Hóast tað seinasta hálva annað árið ikki hevur hilnast væl, so sigur Claus Bech Jørgensen seg ikki ætla at stinga í sekkin og flyta úr Onglandi og heim til Danmarkar, har hann kanska kundi fingið møguleikan at spælt í bestu deildini. Eitt nú hevur tað verið nevnt á onkrum heimasíðum, sum hava við AaB at gera, at Claus Bech Jørgensen kanska hevði verið ein møguleiki fyri styrki, nú tað í januar aftur er loyvt at keypa og selja fótbóltsspælarar.

Sambært lokalu pressuni í Horsens var kona føroyska landsliðsspælaran sett til at eiga í dag, og um tað gongst, sum Claus ætlar, at tað skal gera, so fer nýføðingurin at liva síni fyrstu ár í Onglandi.

– Okkum hevur dámað sera væl her í Onglandi. Vit hava flutt ikki so lítið. Tað sigur seg sjálvt, at vit hava gjørt tað, tá ið eg í ellivu ár havi umboðað átta feløg. Vit síggja hetta sum ein dreym og møguleika, og tað hevur stóran týdning fyri meg at búgva tætt við felagið, sum eg umboði.

Tá ið Claus av danska blaðnum verður spurdur, um hann hevur fingið nakað tilboð, so sigur hann nei, og so leggur hann afturat, hvat hann kundi hugsað sær:

– Nú umboði eg eitt felag í næstbestu deildini, og eg hevði avgjørt einki havt ímóti, at eg eisini í framtíðini fekk høvi at umboða felag í 1. deild. Men um tað ikki fer at bera til, so vil eg fegin enn eina ferð royna meg í 2. deild. Tá ið eg umboðaði Bournemouth hilnaðist tað rættuliga væl.

# Claus hevur fingið nýggjan venjara

**Hósdagin varð Peter Reid sagdur úr venjarastarvinum í Coventry, har hann hevur havt ábyrgdina síðani í mai í fjør**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Um tað fer at bera nakran glotta fyri føroyska landsliðsspælaran í felagnum, Claus Bech Jørgensen, við sær, er óvist. Men tað er ein veruleiki, at Coventry í fyrradagin skifti venjara. Peter Reid og vit eru samdir um, at vit skulu ikki halda fram við samstarvinum, varð sagt í tíðindaskrivinum, sum varð almanna kunngjørt. Soleiðis plagar tað at verða sagt, tá ið ein venjari, sum felagið innast inni heldur av, skal hava sekkin, tí naggatódn er komin í. Coventry er fjórði aftast í næstbestu eingilsku deildini.

Enn er eingin avgerð tikin um, hvør nú skal eiga ábyrgdina. Fyribils skal vinmaðurin hjá Peter Reid seinastu tjúgu árini og hjálparvenjarin hjá honum í Coventry, Adrian Heath, hava ábyrgdina. Tað skal hann hava seinnapartin í dag, tá ið Coventry í triðja umfarinum í FA Cup skal spæla móti Crewe.

Tað hevur ikki hilnast nakað serligt hjá Peter Reid, síðani hann kom til Coventry. Teir hava spælt 31 dystir. Tíggju ferðir hava teir vunnið, átta ferðir hevur verið javnleikur, og trettan ferðir hevur Coventry einki fingið burturúr.

Síðani hann fyri hálvum øðrum ári síðani flutti til Coventry, heldur Claus Bech Jørgensen seg ikki hava fingið rættuligar møguleikar at vísa, hvør dugur er í honum. Tí hevur Claus gjørt upp við seg sjálvan, at hann skal flyta til annað felag nú beinanvegin og í seinasta lagið í summar, tá ið sáttmálaskeiðið hjá honum í Coventry verður liðugt. Um tað fer at bera nakrar broytingar við sær fyri Claus, at venjarin nú er farin úr Coventry, veit søgan einki at siga um enn.

# Fimleikafelagið Støkk havt aðalfund

**Tann 23. november hevði fimleikafelagið Støkk aðalfund. Tríggir nevndarlimir stóðu fyri vali, og tey vórðu øll afturvald**

Tey sum stóðu fyri afturvali vóru Jastrid Weihe, Arni Carlsen og Elsa Højgaard, og tey stillaðu øll uppaftur. Tann 1. des. skipaði nevndin seg soleiðis: Arni Carlsen, formaður, Jastrid Weihe, næstformaður, Annie Højgaard, kassameistari, Elsa Højgaard, skrivari og Kinna F. Olsen, nevndarlimur. Eykanevndarlimir eru Unn Steingrund og Jákup Andrias Hentze.

Eisini hevði Støkk eykaaðalfund 29. des. 2004, her var á skránni nýggj Støkkhøll. Støkk hevur í drúgva tíð arbeitt við at betra umstøðurnar til fimleikin og felagslív annars. Nevndin er nú komin so mikið áleiðis við hesum arbeiði, at aðalfundurin skuldi taka støðu til um farast skal fara víðari við hesum arbeiði.

Eykaaðalfundurin tók einmalt undir við teimum ætlanum nevndin legði fram, og gav nevndini heimild at fara víðari við projektering av hesum arbeiði. Eisini gav aðalfundurin nevndini heimild at avhenda verandi Støkkhøll.

Eykaaðalfundurin samtykti eisini at heita á nevndina at arbeiða skjótt við hesum, soleiðis at møguleiki kann vera hjá Støkk at flyta alt virksemi í nýggja høll tá felagið fyllir 40 ár, tann 23.11.2006.

Fimleikafelagið Støkk hevur í dag uml. 500 íðkandi limir, sum venja í fýra ymiskum hallum.